# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

## Tað gloymda kríggið í Gaza


*Palestinski forsætisráðharrin, Ismail Haniyeh, kannar skaðan av einum ísraelskum raketttálopi.*
*Mynd: Reuters*

**Í hesum døgum tosa altjóða fjølmiðlarnir bara um kríggið í Libanon, og tí frættist einki frá krígnum í Gaza. Men tað heldur fram**

Bardagarnir í Gaza halda fram í skugganum av krígnum í Libanon, og tann seinasta mánaðin hava 169 palestinar latið lív í ísraelskum álopum. Bara ein ísraelskur hermaður er fallin, og hann doyði, tá ísraelskir hermenn skutu hann av misgáum.

Síðani viðgongdir palestinar burturfluttu ein ísraelskan hermann tann 25. juni, hevur ísraelska hermegin søkt av nógvum málum í Gaza-geiranum. Ísrael sigur, at herurin og flogvápnið hava fingið boð um at oyðileggja samskiftis- og samferðslukervið hjá yvirgangsmonnunum. So seint sum mánadagin bumbaðu ísraelsk flogfør mál í Gaza. Palestinar hava svarað álopunum við at senda 71 heimagjørdar rakettir inn í Ísrael. Í sama tíðarskeiði hava ísraelsmenn skotið 1.050 granatir inn í Gaza-geiran, skrivar AP.

Í gjár royndi ein norsk semingsnevnd at sleppa inn í Gaza-geiran, men mátti venda aftur, tí Ísrael hevði stongt marknaliðini. Útlendskir eygleiðarar hava smáar vónir um frið í Gaza, eftir at ísraelski herurin hevur tikið formannin í palestinska tjóðartinginum við teirri grundgeving, at hann er limur í Hamas. Tann seinasta mánaðin hava ísraelsmenn tikið 64 Hamas-leiðarar.

Ísraelsku álopini á Gaza hava fingið fólk at venda sær ímóti Ísrael. Í januar vísti ein meiningakanning, at bara 25 prosent av palestinunum í Gaza tóku undir við ætlanini hjá Hamas at strika Ísrael av heimskortinum. Nú vísir ein tilsvarandi kanning, at 55 prosent styðja Hamas. Tann sama kanningin vísir, at 97 prosent av palestinunum styðja Hizbollah í bardaganum við Ísrael.

## Royna aftur

Frakland og USA ætla at gera enn eina roynd at orða eitt uppskot, sum skal fáa frið í Libanon.

Tað fyrsta uppskotið um vápnahvíld í Libanon fór fyri bakka, tí hvørki libanska stjórnin ella Arabiska Samgongan kundu góðtaka tað, tí tað kravdi ikki ísraelska afturtøku úr Suðurlibanon.

Men Frakland og USA gevast ikki so. Aftan á ein fund við umboð fyri Arabisku Samgonguna í gjár segði franski ST-sendiharrin, Jean-Marc de la Sabliere, at tey bæði londini fara at gera eina roynd afturat.

- Hesaferð ætla vit at gera eitt uppskot, sum allir partar kunnu taka undir við, og vónandi kann tað samtykkjast í trygdarráðnum seinni í vikuni, segði sendiharrin, eftir at hann hevði tosað við tey arabisku umboðini.

Á fundinum við franska ST-sendiharran gjørdu tey arabisku umboðini greitt, at ísraelsk afturtøka er ein treyt fyri, at tann arabiski heimurin kann góðtaka eina vápnahvíld. Uttanríkisráðharrin í Qatar, Hamad bin Jassem bin Jabr al-Thami, legði ikki fingrarnar ímillum:

-Tað verður borgarakríggj í Libanon, verða teir ísraelsku hermenninir ikki tiknir úr landinum, segði hann. Hann vildi vera við, at ST-trygdarráðið hevði sitið hendur í favn og hugt at tí, sum hendir í Libanon.

- Trygdarráðið skuldi heldur gjørt alt fyri at steðga blóðbaðnum, sum er vorðið gerandisdagur hjá libanska fólkinum, segði al-Thami og legði afturat, at tað, sum nú hendir, fer at elva til meiri hatur og stríð í økinum.

Samstundis sum Frakland og USA arbeiða við at orða eitt uppskot um vápnahvíld, kunngjørdi ísraelska stjórnin, at hon umhugsar at herða átøkini í Libanon. Sum skilst umhugsar stjórnin at senda ísraelska herin norður til libansku ánna Litani, sum er einar 20 kilometrar norðan fyri markið.

### Lupu á flóttafólkalegu

Libanskar keldur upplýstu í morgun, at ísraelsk herskip høvdu søkt at einari palestinskari flóttafólkalegu í Suðurlibanon í nátt. Eingin doyði í álopinum, men libanska løgreglan segði, at 15 fólk, teirra millum fleiri børn, vórðu særd.

Umleið 50.000 palestinar búgva í leguni, og hetta er fyrstu ferð, at ísrael hevur søkt at henni. Sambært libansku keldunum sendi eitt ísraelskt herskip tvær granatir inn í leguna. Tað hevur Ísrael váttað, men sigur, at granatirnar vóru ætlaðar Hizbollahlimum, sum fjaldu seg í flóttafólkaleguni.

Havnar Bio

kall Coca-Cola




Peter Pedal

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mikudag | 09.08. | kl. 15.30 | kl. 17.30 |
| Hósdag | 10.08. | kl. 15.30 | kl. 17.30 |




Superman

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mikudag | 09.08. | kl. 19.30 | kl. 22.45 |
| Hósdag | 10.08. | kl. 19.30 | kl. 22.45 |




Pirates of Carribean 2

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mikudag | 09.08. | kl. 21.30 | |
| Hósdag | 10.08. | kl. 21.30 | |




The Break-up

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mikudag | 09.08. | kl. 19.00 | |
| Hósdag | 10.08. | kl. 19.00 | |




Garfield 2

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mikudag | 09.08. | kl. 16.30 | |
| Hósdag | 10.08. | kl. 16.30 | |

KOMANDI FILMUR




Take the Lead FRUMSÝNING

Fríggjadag 11.08.

www.bio.fo • Telefon 31 19 56
Stórt úrval av DVD-filmum til sølu